# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**

17. juli fingu Jastrid og Pauli Høj eina dóttur á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Hon vigaði 2527 gr og var 47 cm long. Hon eitur Sara.

23. juli fingu Súsanna og Jan Sigurðsson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3350 gr.

23. juli fingu Sunneva Jakobsen, Tórshavn og Mark Craig, Liverpool eina dóttur. Hon varð født á Liverpool Women's Hospital. Hon vigaði 3700 g og eitur Freya Rose.

23. juli fingu Rannvá undir Kletti og Árni Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

26. juli fingu Gunnbjørg og Torri Thomsen, Sumba eina dóttur. Hon vigaði 4000g og var 54 cm long.

26. juli fingu Tórunn og Petur Steingrund, Skála eina dóttir. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

26. juli fingu Rúna Antiniussen og Kári Dal Chrisiansen, Hoyvík ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4650 gr.

27. juli fingu Jóndis og Kaj Madsen, Hvalba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4300 gr.

28. juli fingu Gunna og Jón við Neyst, Tórshavn eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4050 gr.

28. juli fingu Jannet Mikkelsen og Eiler Hansen, Søldarfjørður eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

29. juli fingu Maria N. og Thomas B. Thomsen, Tórshavn eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

30. juli fingu Lydia Vesturtún og Alfred Jacobsen, Eiði eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.

31. juli fingu Joan og Ingi Skorheim, Kvívík ein son. Hann var 53 cm og vigaði 3100 gr.

31. juli fingu Elin K. Jacobsen, Klaksvík og Rói Jacobsen, Tvøroyri ein son. Hann var 55 cm og vigaði 3600 gr.

1. aug. fingu Ása Poulsen og Bjarni Beder, Tórshavn eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4150 gr.

1. aug fingu Durita Káradóttir og Báraldur J. Joensen, Strendur ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4250 gr.

1. aug fingu Elinborg og Michael Kærsgaard, Hósvík ein son. Hann var 58 cm og vigaði 4600 gr.

1. aug fingu Sigrid Simonsen og Ólavur Ellefsen, Tórshavn ein son. hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

**Dagarnir um vikuskiftið**
**Leygardagin, 5. august. Ásvaldur**
Deyður 642. Enskur kongur, sum var sera ágrýtin í trúboðaravirki í landi sínum. M.a. bygdi hann á oynni Holy Island við landnyrðingsstrond Onglands kleystrið Lindisfarne, ið víkingar løgdu í oyði í árinum 793. Ásvaldur fell í einum bardaga við heidna kongin Mercia. Navnið er gamalt enskt, ið merkir Guð ræður.

**Sunnudgin, 6. august. Kristi dýrd**
Dagur hildin til minnis um Jesu umbroyting á fjallinum (Matt. 17, 1-9).

**Mánadagin, 7. august. Donatus**
Deyður umleið 380. Drongurin Donatus misti bæði foreldrini, og undan forfylging flýddi hann til Arezzo í Italiu. Varð prestlærdur og endaði sum biskupur har á staðnum. Seinni varð hann tikin og hálshøgdur.

# Fólkafundur á Skarðinum

**Fuglafjørður:** Verður veðrið til vildar sunnudagin skipar Kunningarstovan í Fuglafirði fyri fólkafundi á Skarðinum.

Hetta er tann árligi fólkafundurin sum enn einaferð stendur á skránni. Hesaferð verður Signar á Brúnni røðari. Umframt hesa røðuna verður eisini sangur á skránni.

Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14 sunnudagin. Heitt verður á fólk um at hava matpakka og drekka við.

**sb.**

# Suðuroyar Sparikassi tillagar rentuna



**Suðuroyar Sparikassi tillagar nú rentuna eftir altjóða rentuni, við at hækka rentuna á útlánum við 0,40 prosentum. Í sama viðfangi tillagar hesin sparikassin innlánsrentuna.**
**Rentuhækkingin kemur í gildi komandi mikudag**

**RENTA**
– Hin Europeiski Meginbankin, ECB, hækkar leiðandi rentuna 0,25 prosent hin 9. august.

– Tí lagar Suðuroyar Sparikassi nú sínar rentur til hækkaða altjóða rentustøðið, verður sagt.

Við hesi hækkingini er leiðandi rentan hjá Europeiska Meginbankanum soleiðis hækkað 1,0 prosent síðani 6. desembur í fjør, tá ECB byrjaði at hækka rentuna. Við hesum er skiftandi rentan á bústaðarlánum hjá Suðuroyar Sparikassa eisini hækkað 1,0 prosent sama tíðarskeið.

Lægsta rentan til bústaðarlán í Suðuroyar Sparikassa hækkar tí úr 4,05% p.a. til 4,45% p.a.

**sb.**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, ið varð sýnt okkum, tá okkara góði

**Henning Olaf Joensen**

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Takk tit mongu, ið vitjaðu hann í heiminum og á Ellis- og avlamisheiminum í Vágum, tá hann lá sjúkur.
Takk til starvsfólkið á Sjúklingahotellinum Tórshavn og sjúklingavegleiðaran fyri tíðina, hann var har hjá tykkum í Keypmannahavn.
Takk til heimasjúkrasystrarnar, sum vóru um hann í heiminum.
Takk til leiðaran og tykkum øll á Ellis- og avlamisheiminum, sum gjørdu so nógv fyri hann og vóru um hann til tað síðsta.
Takk til David Johannesen, prest, fyri vitjanina.
Takk til Ingu P. Dam, prest, fyri góð og troystarrík orð á Ellisheiminum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar og tit mongu, sum hjálptu til við ymiskum, bæði tá hann lá sjúkur og til jarðarferðina.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til Miðvágs kirkju.
Takk til sangarar og til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.
Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Thorborg**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá góða systir, svigarinna, mostir og fastir okkara

**Gunvør Joensen**
*hjá Ernst hjá Ísaki*
Tórshavn

doyði og varð jarðað.
Tøkk til Hera Joensen, prest, og kirkjutænarar,
Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk øll tit, ið fylgdu Gunvør til hennara seinasta hvíldarstað.

**Eivind, Dukki og Hanna við familjum**

# Tøkk

Hjartans tøkk veita vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri bróðir

**Sverri Eidesgaard**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar, eins og til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávur til kirkjuna og til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Brynhild og Aðalbjørg**